Meginfelag Áhugaleikara Føroya
Undir Pisuvarða 2 * FO-100 Tórshavn * Tel. 285624 * E-mail: maf@maf.fo * www.maf.fo

Ljós- og ljóðskeið 27.-29. apríl 2018

Brennur tú fyri at arbeiða við ljós- og ljóði á ein kreativan hátt? So er møguleiki at tekna teg til eitt **víðka ljós- og ljóðskeið í Losjuni við Gøtugjógv 27. – 29. apríl 2018**. Dentur verður serliga lagdur á, hvussu ljós og ljóð verður brúkt í sambandi við leikuppseting. Hóast tað er ein fyrimunur at hava luttikið á fyrra skeiðnum, ið var í mai 2017, er hetta ikki eitt krav. Undirvísingin verður á donskum og føroyskum.

Undirvíst verður fríggjadag til sunnudag frá kl. 09.00-18.00 allar dagarnar. Íroknað skeiðið er ein máltíð á middegi, millumáli og kaffi/te.

Lærarar verða **Súni Joensen** og **Asger Kudahl Sørensen**.

Prísurin fyri skeiðið er **kr. 1.500,-** fyri hvønn luttakara. Avmarkað pláss.

Skeiðið er bert fyri tey, ið arbeiða við ljósi og ljóði í samband við leikuppseting o.ø. hjá limafeløgunum hjá MáF. Luttakararnir skulu tí tekna seg til skeiðið ígjøgnum limafeløgini.

Tilmelding skal sendast við t-posti til MáF á maf@maf.fo. Skráseting er fyrst galdandi, tá ið goldið er á konto í **Eik Banka: 185 132 4 í seinasta lagi 31. mars 2018**.